# Faklig kick!

## Fyri summarfrítíðina 2007

**Fakfestival fyri Fjølmiðlar '007** 5. mai
**Skeið fyri sjálvstøðug** 12. mai
**Networkshop fyri sjálvstøðug** seinnapartin 12. mai
**Starvsfólkahondbók** (útselt) 4. juni
**Starvsfólkahondbók** (max. 12 - fá pláss eftir) 6. juni

## Eftir summarfrítíðina 2007

3. sept. **Umsorganarsvik hjá børnum v/Inger Thormann**
4. sept. **Terapi fyri børn v/Inger Thormann**
8. sept. **Tín framtíð sum Drotning** (fá pláss eftir)
15. sept. **Tín framtíð sum Drotning**
27. okt. **Lívsstílsstevnan '007** (uml. ½ av básunum seldir)
4. nov. **Stig fyri Stig** (Trin for Trin)

27. og 28. oktober 2007

## '007 Lívsstílsstevnan

**Selur tú lívsstíl?**
Selur tú eina vøru ella tænastu, sum er sunn, sprelsk ella stylish? Ella er hon á annan hátt eitt MUST á eini lívsstílsstevnu? So er tað nú tú eigur at smekka til... Tann 27. og 28. oktober skipar Synergi fyri einari stórari lívsstílsstevnu í Ítróttarhøllini á Hálsi. Tann fyrsta av sínum slag í Føroyum.

**Tryggja tær bás**
***- avmarkað tal av básum innan hvønn vørubólk!***
Skalt tú vera vís/ur í at fáa bás, ræður um at skunda tær. Nærum helmingurin av básunum eru longu seldir. Tryggja tær bás og les meira um lívsstílsstevnuna á www.synergi.fo ella ring 22RING (227464).



12. mai 2007



## Networkshop
### fyri SJÁLVSTØÐUG

Kom og netverka við onnur sjálvstøðug. Leygardagin 12. mai kanst tú fáa tjekk uppá alt viðv. lán, sjúku, arbeiðsloysi, eftirløn og tryggingar. Alt á einum stað - sama dag.

**Einans 375,00**
- og tá kanst tú draga mvg frá ;-)

**Fyrilestrar og workshops**:
Almannastovan, ALS, Betri Pensjón, Eik, Føroya Banki, Lív og Tryggingarfelagið Føroyar

4. og 6. juni 2007

## Starvsfólkahondbókin
- eitt MUST úr HR-amboðskassanum

**Lættari kann tað ikki gerast - ein fløga fylgir við!**
Tann 4. juni og 6. juni bjóða vit eina workshop um uppbygging av eini starvsfólkahondbók. 4. juni er útselt, men nøkur pláss eru til 6. juni. Max. 12 luttakarar. Flextíð, avspáking, jarðarferðir, tannlækna, royking, menningarsamrøður... Somu spurningar stinga seg upp umaftur og umaftur - tú uppfinnur trúliga djúpa tallerkin hvørja ferð. Ein starvsfólkahondbók gevur tær og tínum starvsfólkum nakrar leiðreglar at halda tykkum til, soleiðis at tit sleppa undan diskussiónum og kanska kegli um hópin av spurningum. Eingin orsøk at gera tað truplari enn neyðugt. Tú fært eina fløgu við einum dømi uppá eina konkreta starvsfólkahandbók við tær eftir lokið skeið. So er lagamanni at tillaga bókina, so hon hóskar júst til tykkara arbeiðspláss.

**Les meira og tekna teg á**
www.synergi.fo



3. september 2007

## Inger Thormann
- umsorganarsvik hjá børnum

Tann 3. september 2007 skipa vit fyri einum sera vikomandi skeiði um umsorganarsvik hjá børnum. Inger Thormann, sosialpedagogur og cand. psyk. er skeiðleiðari. Hon hevur arbeitt á Skodsborg síðani 1982 og hevur skrivað nógvar bøkur um evnið. Á skeiðnum lærir tú um mest grunnleggjandi formarnir fyri umsorganarsvik. Tú lærir at eygleiða børnini, at kenna aftur ymisk tekin uppá umsorganarsvik og hvussu tú á bestan hátt kann hjálpa hesum børnum.

Frálæringin fer at skifta ímillum teori og dømi frá praksis. Harumframt verða eisini videoupptøkur vístar. Fyrireiking til skeiðið er ikki neyðug, men sjálvandi fært tú meiri burturúr, um tú frammanundan minnir teg á konkret dømir um umsorganarsvik, sum tú hevur sæð í tínum arbeiði.

Les meira um skeiðið og tekna teg á www.synergi.fo ella ring 22RING (227464).

Øll eru vælkomin at vitja okkara heimasíðu www.synergi.fo

Synergi samskipar og skipar fyri, eisini fyri teg... Skalt tú skipa fyri einum stórum tiltaki - ella einum lítlum - so eru vit røttu fólkini, við røttu førleikunum og rætta netverkinum. Ring 22RING ella kima 22KIMA um óbindandi prát!

Synergi